# John Dam farin



Hóskvøldið andaðist John Dam, skipari og fyrrverandi reiðari í heiminum í Hoydølum, 70 ára gamal, eftir langa sjúkralegu.

Fyri John Dam var sjógvurin stóri parturin av lívinum, frá tí hann fyrstu ferð fór til skips við pápa sínum, 13 ára gamal.

John Dam var ættaður úr Vestmanna. Hann var sonur Viggo Dam – Viggo í Skúlanum – og Mathildu. Hann giftist við Unn Niclasen, dóttir Birruna og Zacharis á Skipafelagnum. Tey áttu børnini, Hans Andreas, Maritu og Zacharis. Unn doyði í 1966.

John giftist seinni uppaftur við Oddvør Jacobsen úr Fuglafirði, dóttir Jóhannus, Skómakaran, og Ellifíu.

John var ikki bara kendur sum rokskipari, men hann var eisini maðurin, sum royndi eftir nýggjum fiskasløgum, eitt nú eftir hemara í Kanada, eftir laksi við gørnum undir Grønlandi, og hann var maðurin, sum seinast í sekstiárunum legði lunnar undir rækjuveiðina undir Grønlandi. Hann gjørdi eisini drúgvar royndir at veiða skeljar við tí nýggjasta Fame.

# Altjóða brotsmannadómstólurin settur á stovn

MANNARÆTTINDI
*AI Føroya Deild*

Amnesty International Føroya Deild fegnast um, at 66 lond nú hava undirskrivað sáttmálan um Altjóða Brotsmannadómstólin. Hetta hevur við sær, at dómstólurin verður settur á stovn í dag, 11. apríl 2002, og um stutta tíð kann fyrsti altjóða brotsmannadómstólurin í heimssøguni fara til verka.

Hetta er týdningarmikið stig í arbeiðinum at fáa sett persónar, sum hava framt álvarsom brot móti mannarættindunum, fyri ein rætt. Dómstólurin verður ein týðandi partur av arbeiðinum at skipa altjóða rættvísi og at steðga brotum á altjóða mannarættindini. Líka síðani Seinni Heimsbardagi endaði hevur verið arbeitt við at fáa stovnað ein slíkan altjóða dómstól, men ikki fyrr enn nú hevur politiski viljin verið nóg stórur til, at ein slíkur dómstólur kundi verða settur á stovn.

Í grundini eru hugsanirnar aftanfyri dómstólin sera einfaldar, men hóast hetta er talan um kollveltandi hugsanir sum t.d.:

- Altjóða samfelagið hevur felags ábyrgd av brotum á altjóða mannarættindini.

- Einstaka menniskja hevur ábyrgd fyri sínum gerðum.

- At siga at gerðir vóru gjørdar eftir boðum frá hægri myndugleikum frítekur ongan fyri at hava ábyrgd av mannarættindabrotum.

- Heldur ikki statsleiðarar eru frítiknir frá revsing fyri brot á mannarættindini.

Til ber at lesa meira um Altjóða brotsmannadómstólin á heimasíðuni hjá Amnesty International: www.amnesty.org

# 23. apríl – Santa Jørundsdagur er heimsins bókadagur

BÓKADAGUR
*Tíðindaskriv*

Jørundur, ella St. Georg sum hann eisini verður nevndur, er kendur frá enskum søgnum fyri at hava dripið ein griman dreka. Hesar sagnir kunnu so væl hava sama uppruna sum tær hjá okkum so væl kendu um Sjúrð, sum á Granabaki gjørdi av við drekan.

Sjúrðarkvæðini eru okkara størsti skaldsligi arvur, so dagurin kann valla verða betur valdur, sæð við okkara eygum.

At royna at gera vart við bókina ein serligan dag er ikki nakað nýtt uppfinnilsi – Tað hevur verið roynt av og á at havt føroyskar bókadagar síðani einaferð í sekstiárunum.

Og UNESCO heldur eisini sum vit, at tað er týdningarmikið at seta fokus á bøkurnar. Fyrimyndin var ein gamul traditión úr katalonska partinum av Spaniu. Har er siður á Jørundsdegi at geva eina rósu og eina bók til ein, mann er góður við. Rósan ímyndar kærleikan og bókin forstáilsi, tolsemi og samrøðu.

Tað sum hendir í SMS er upplestur úr nýggjum, føroyskum barnabókum. Tað eru tey trý frá barnaløtuni hjá útvarpinum Jonna, Kári og Katrin sum koma at lesa úr nýggjum føroyskum barnabókum.

Tey siga frá søgunum soleiðis:

Klokkan 10.30.11.15 – Margreta og Mjólkin og Tá ið Findus lítli hvarv

Klokkan 14.00-14.15 – Ì Geyma og Tá ið Leiku liva

Klokkan 16.00-16.45 – Geislasteinar og Tsatsiki og mamman

Bókin “Gita hvussu góður eg eri við teg” verður seld so leingi nøkur er á goymslu fyri einans 10,- kr. Hendan ótrúliga fitta bókin um lítla harungan er seld í metstórum uppløgum úti í heimi.

# Yvirlýsing frá Javna

TÍÐINDASKRIV

Ásannandi at støðan hjá fólki við menningartarni als ikki er nøktandi í føroyska skúlaverkinum, staðfestir Javni hesa yvirlýsing:

Børn og ung við menningartarni hava – sum øll onnur – rætt til framhaldandi skúlagongd, sum skal vera lagað til serstaka tørvin, antin í skúla, tey náttúrliga hoyra til, ella í serskúla.

**Virkast má fyri,**
- at fólkaskúlin fær umstøður at taka sær av næmingum við serligum tørvi,
- at sernámsskúlar fáa dagførdar og betraðar karmar at virka undir,
- at lærarar og stuðulsfólk fáa hóskandi útbúgving og eftirútbúgving til dygdargott og miðvíst at kunna undirvísa næmingum við menningartarni eftir næmingsins fortreytum,
- at øll hava møguleika at velja hóskandi skúla – uttan mun til bygd ella bý,
- at ung og vaksin við menningartarni fáa atgongd til eftirskúlar og háskúlar.

Amnesty:

# Barnatekningar á internetinum

TÍÐINDASKRIV
*Amnesty International Føroya Deild*

Tekningarnar, sum komu inn til barnateknikappingina hjá Amnesty í november, eru lagdar á heimasíðuna:

http://www.amnesty.fo

Undirtøkan var stór til kappingina, umleið 140 myndir komu inn.

**Aðalfundur**

Aðalfundurin í ár verður hóskvøldið 18. apríl kl. 19.30 á Landsbókasavninum. Á skránni er umframt frágreiðingar frá farna árið m.a. uppskot til lógarbroyting. Vit meta, tað er neyðugt at broyta lógina, í fyrsta lagi tí at viðtøkurnar fyri Amnesty International vóru broyttar á ICM, altjóða aðalfundinum í Dakar í august 2001, og í øðrum lagi tí summar ásetingar í lógini eiga at verða dagførdar. Um onkur hevur hug at lesa uppskotið til lógarbroyting, finst tað á heimasíðu okkara:

http://www.amnesty.fo undir Nýtt.

**Miðeystur**

Í sambandi við álvarsligu kreppuna í Miðeystri hava vit fingið Hans Holm at koma á aðalfundin at greiða frá um Miðeystur. Hann fer m.a. at greiða frá søguni aftanfyri stríðið millum partarnar. Amnesty fylgir neyvt við gongdini í Miðeystri. Áhugaði kunnu lesa meira á altjóða heimasíðuni:

http://www.amnesty.org

# Tøkk

Eg vil takka tykkum hjartaliga, sum heiðraðu meg á mínum 60 ára føðingardegi 19. mars.

Gud signi tykkum øll.

Heilsan
**Helgi Augustinussen**

# Rock konsert við Chain, Iris og Stinkfist í Atlantis

KONSERT
*Tónleikafelagið Sjey00*

Í annaðkvøld, leygarkvøldið 20. apríl kl. 22.00, skipar tónleikafelagið Sjey00 fyri konsert í mentunarhúsinum Atlantis í Klaksvík.

Á hesi fyrstu konsert hjá felagnum verða bólkanir Chain, Iris og Stinkfist at hoyra.

Nógv hevur ikki verið at hoyrt frá hesum bólkum - umframt at hava spælt m.a. í Atlantis, hevur Chain spælt til eina Free Føroyar konsert, meðan Iris og Stinkfist áður hava luttikið í Prix Føroyum - men leygarkvøldið fáa klaksvíkingar so høvi at hoyra hvat teir lokalu rockbólkarnir hava at bjóða áskoðarunum. Bilettur til konsertina fáast við dyrnar.

Sama leygardag kl. 17.00 verður stovnandi aðalfundur hjá tónleikafelagnum Sjey00 í býráðshøllini í Klaksvík, har øll áhugaði eru vælkomin og har tað m.a. ber til at tekna seg sum lim í felagnum.



